# TILTØK

**Frelsunarherurin, Tórsgøta**
Týsdagin kl. 17.30 Juniorhornvenjing, kl. 20 Seniorhornvenjing.
Mikudagin kl. 15 Bønarfundur, kl. 17.30 Títtlingasangur fyri foreldur við børnum frá 2 ár til 4 ár (nýggj kunnu tekna seg nú).
Barnarøddir fyri 4 ár og uppeftir venja kl. 19.00
Hósdagin kl. 20 Heimaforbundið. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Meinigheitshúsið**
Týsdagin kl. 20 Bíbliutími – Katekismus.
Mikudagin kl. 19 Venur Meinigheitskórið.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ nevndini.
Fríggjadagin kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jórun og Nurlan.

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20 verður Bíbliutími og bønarløta. Páll Poulsen talar um eina nýggja byrjan (1. Mós. kap. 8-9).

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í morgin kl. 19 Delli.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
www.filadelfia.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti har Jógvan Z. talar um evnið: Nýtt ár – nýggj byrjan.
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 er Signing av børnum. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Zachariassen um Samkomurnar í Opinberingini – Hvat Kristus sigur Lívdini. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 (í eini skúlastovu). Bíbiltími har Jógvan Z. undirvísir um Opinberingina kap. 13.
www.livdin.fo

**Havnar kirkja**
Várkonfirmatiónirnar 2004 verða 21. mars, 28. mars og 4. apríl. Konfirmantarnir skulu møta í Havnar kirkju mikudagin 14. januar kl. 15. Markið millum eystaru og vestaru sókn er Tróndargøta, Varðagøta, Villingardalsvegur.

**Vesturkirkjan og Argja kirkja**
Várkonfirmatiónirnar 2004 verða í Vesturkirkjuni 28. mars og 4. apríl og í Argja kirkju 4. apríl.
Konfirmantarnir skulu møta í Vesturkirkjuni mikudagin 14. januar kl. 15. Markið millum vestaru og eystaru sókn er Tróndargøta, Varðagøta, Villingardalsvegur.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Vestmanna**
Missiónsvikan byrjar í kvøld kl. 20 har Mogens T. Christensen, prestur, talar og sangbólkurin Gittit syngur. Mikukvøldið kl. 20 Møti við fólki úr Vík og Tjørnuvík við talu og sangi. Bønarmøti er 1/2 tíma undan hvørjum møti.

**Gøta**
Týsdagin kl. 20, Glyvra-Hanusars húsi, bibeltime v. Peter O. K. Olofson: 1 Thess 1.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30 Arvid Hansen talar. Evnið: Visiónir (Orðt. 29:18). Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Mikudagin kl. 20 Bønarmøti. Vælkomin í Betania.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Í kvøld kl. 20 Heimaforbundið.
Onskvøldið kl. 19 Juniorsoldátmøti.

**Betania, Porkeri**
Í kvøld kl. 20 Kvinnumøti.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 12. januar***
kl. 10-10.30 Fimleikur
kl. 10.15-12 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
***Týsdagur 13. januar***
kl. 10-11.30 Sangur. Jóhan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 14.30 Byrja at samla gamlar myndir frá barnaárunum til eina framsýning. Alt hevur áhuga
***Mikudagur 14. januar***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Til ber at koma sum gestur.
kl. 15 Túrur (sjá skránna í bløðunum)
kl. 15-21 Opið hús
***Hósdagur 15. januar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen. Aftaná føroyskur dansur: børnini á býlingshúsinum á Norðasta Horni vísa sítt dansikynstur
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
**Fríggjadagur 16. januar**
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Til ber at koma sum gestur. Tilmeld. mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Pensionistafelagið í Havn**
Fundirnir byrja aftur mikukvøldið 14. januar kl. 19.00.

**Frá Eldrafelagnum Nón Saltangará**
Vit koma saman í Hæddini týskvøldið kl. 19.30 til Hugnaløtu og burturluting.

Nýggir limir eru vælkomnir við.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
**Mánadagin 12. januar**
Fimleikur v/ Jóhannu Troest.
Drekkamuður
**Týsdagin 13. januar**
Vit fáa vitjan av politikarum.
Drekkamuður – framløga
**Mikudagin 14. januar**
Videofilmur verður vístur: tikin í Føroyum tá pensionistar úr Svendborg vitjaðu summarið 2003 – Drekkamuður
**Hósdagin 15. januar**
Drekkamuður.
Vit syngja sálmar og sangir
**Fríggjadagin 16. januar**
Opið hús. Kaffi, te og pannukøkur

*Gjørt verður vart við, at væl ber til at nýta Eysturoyarleiðina til Fløvan. Um spurningar eru, eru tit vælkomin at ringja 448051.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
**Mikudagin 14. januar**
Upplestur

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.
Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið*
*Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 13.00-16.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50.

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 fax 313609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
*Íslandsvegur 10c*
*FO-100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Tlf. 317373, fartlf. 264839 faks. 310813
Teldupostur: mbf@mbf.fo
Heimasíðan: www.mbf.fo

## SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 21. januar hava hjúnini Sólborg og Osbjørn Joensen, Skálabotn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 24. januar í Bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 24. januar kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 441596 ella 214124 áðrenn 14. jan.

Týsdagin 17. februar hava hjúnini Ruth og John Myllhamar í Sandavági verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í SÍF-húsinum kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn sunnudagin 8. februar á tlf. 333399 ella 533399.


# Fløskuskiljari
## til Miklagarð í SMS

Miklagarður í SMS søkir eftir fløskuskiljara til fløskuautomatina at byrja skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er sett til 32,5 tímar um vikuna.

Løn eftir nærri avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, so ring til Miklagarð á tel 31 30 11 og spyr eftir Johnny Priess.

*Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 vørunummrum. Í Miklagarði starvast 80 fólk.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11





**MEDITATION**
med Hanne B. Iversen
31. jan.- 1. feb.
og 7-8.feb.
For mere info:
hanne@otenet.gr eller
afhent program i
Siri helsekost. Torshavn

TJEN EKSTRA
i din fritid !
Besøg hjemmesiderne og bestil information:
www.getjobteam.com
www.bodycarevital.com



Minst til haldaragjaldið...!
Sosialurin
Arjgjavegur 26
tel 34 18 00 · fax 34 18 01
e-mail: post@sosialurin.fo


# HEILSANIR



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum sum var 4. jan.
**Ynskja Selma, Rannvá, Allan og Malan**
**PS.** Eisini ein heilsan frá mammu



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið vóru við til at gerða hjúnabandsdag okkara 19. juli 2003 minnisríkan og ógloymandi. Takk fyri gávur og fjarrit. Eisini ein tøkk til øll tykkum, ið hjálptu og vóru við til at fyrireika dagin.
**Laila og Jan Joensen**



**Góðu Rodmund og Jóhan**
Tillukku við 20 og 19 ára føðingardøgunum 12. des og 13. jan. Rodmund tillukku við sveinastykkinum
**Heilsan Elin og Erla**



**Góði elskaði Allan**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 11. jan. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Ynskja mamma, babba, Selma, Rannvá og Malan**



UPPBOÐSSØLA
Keyp og søla av málningum
www.hamarin.fo

Sosialurin
-tað loysir seg


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..........................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .............................................................................
Bústaður: .......................................................................
Bygd/býur: ....................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«


**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
**www.bio.fo**




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 13.01. | kl. 20[30] | Týsdagin | 13.01. | kl. 22[15] |
| Mikudagin | 14.01. | kl. 20[30] | Mikudagin | 14.01. | kl. 22[15] |
| Hósdagin | 15.01. | kl. 20[30] | Hósdagin | 15.01. | kl. 22[15] |




**Bilettprísur: 65,- kr.**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 13.01. | kl. 18[30] | Týsdagin | 13.01. | kl. 23[00] |
| Mikudagin | 14.01. | kl. 18[30] | Mikudagin | 14.01. | kl. 23[00] |
| Hósdagin | 15.01. | kl. 18[30] | Hósdagin | 15.01. | kl. 23[00] |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 13.01. | kl. 18[00] | Mikudagin | 14.01. | kl. 18[00] |
| Hósdagin | 15.01. | kl. 18[00] | | | |

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning Fríggjadagin 16.01.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**